**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI NEYST Í KOLLAFIRÐI**
**SB_Kollafjørður_Neyst_2020_9_202X**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta ~~kortskjali 1, partur av matr. nr 208, 2011c, 211a og 209b, Kollafjørður og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.~~ *Fylgiskjal 1* og røkkur um hesi matr.nr.: 42, 37b, 31b, 29b, 41, 171e, 34b, 173b, 171f, 34e, 171a, 145z, 169, 168, 167, 166, 165, 164, 163, 162, 161, 147b, 185a, 185b, 209b, 230l, 230f, 230g, 230h, 230i, 230k, 230m, 230n, 230o, 283c, 283e, 299, 211a, 211c, 171h, 230u, 230t, 230y, 230v, 230x, 230z, 208b, 208c, 208d, 208e, 208f, 208g, 208h í Kollafirði

Og partar av matr. nr. 145a, 34a, 230a, 280a, 282a, 283a, 332, 283d, 285b, 284a, 291a, 334, 293a, 293p, q, ae, í Kollafirði

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa neystabygging á økjunum, ~~sí kortskjal 1~~:

1. Við Sjógv
2. Á Lygnnesi
3. Á Lygnnesi
4. Við Kópastein
5. Á Signabø
6. Við bátabrúgvarnar á Signabø
7. Á Kjalnesi.

Sí *Fylgiskjal 1*.

Stk. 2. ~~Økið~~ Økini liggja í E øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kunnu brúkast til neystabygging.

Stk. 3.

Sambært ~~kap. IV, §24,~~ kap. II, § 21, stk. 2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at ~~skipan~~ bygging og útstykking á økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleráð í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið verður lagt av til pláss at seta bátar á, og neystabygging, sum lutvíst kann innrættast til frítíðarhús.

Stk. 2. Treytin fyri at loyva frítíðarhúsi í neysti er, at umstøður skulu vera at hava bát í neystinum, og innrættingin til frítíðarhús ikki er á niðastu hædd, umframt at nøktandi rýmingarmøguleikar skulu vera eftir galdandi reglum.

Stk. 3. Neyst, sum lutvíst verða innrættaði til frítíðarhús, skulu íbindast skipaða kloakk og aðrar neyðugar leiðingar, sum verður rindað av neystaeigarunum.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Neystini skulu liggja fram við sjóvarmálan.

Stk. 2. Neystini mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd umframt nýtt loft.

Stk. 3. Neystini skulu ikki vera hægri enn 5 m til hægsta punkt við útvegg og 7 m til mønuna, mált frá planeringshædd.

Stk. 4. Neystini skulu hava mønu, og skal hon vera í miðjuni. Takhallið skal vera millum 35-42 gradir.

## §5. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og skipast skal fyri felags omankoyring.

Stk. 2. 1,5 p-pláss skal vera til hvørt neyst. Hesi kunnu gerast á felags p-plássi.

## §6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.